Havnar Bio · kall · Coca-Cola

UMMÆLI:

# Elizabethtown





Hvussu sigur tú farvæl við ein persón, sum tú nóg illa hevur sagt góðan dag við? Ungi sniðgevin, Drew, heldur seg hava trupulleikar, tá hann fær sekkin. Hetta tí seinasta uppgávahansara kostaði fyritøkuni ein lítla milliard dollarar. At byrja við tekur hann synd í sær sjálvum, men hetta hvørvur tó, tá hann brádliga fær at vita, at pápi hansara er deyður á vitjan hjá familjuni í Elizabethtown. Og nú vil mamman hava hann at taka øskuna við til heim teirra.

Tað at hitta familjuna í Kentucky fær Drew at ásanna, at hann ongan tíð av álvara kendi pápa sín. Men við nakað av íblástri frá altíð bjartskygnu flogternuni, Claire, roynir Drew at vinna á tyngjandi kenslunum, soleiðis at hann kann skapa sær eina nýggja tilveru. Ein tilvera, sum heldur enn gjarna eisini skal innihalda fittu Claire. Men kringsettur av heldur serliga húskinum – og eini hysteriskari mammu – hevur Drew ofta trupulleikar at finna útav, hvar hansara egni persónur stendur í øllum meldrinum…kanska er hann bara sonur pápa sín.

Tað er Camaron Crowe, sum hevur skapt til tíðir stuttliga men eisini heita filmin um teir týdningarmiklu lutirnar í lívinum, soleiðis sum hesir tykjast í útsýninum frá Elizabethtown. Høvuðsleiklutirnar sum Drew og Clair hava Orlando Bloom og Kirsten Dunst.

TÍÐIRNAR:

Stórt úrval av DVD–filmum til sølu




## Jarhead

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 20.01 | kl. 23.15 | |
| Leygardag | 21.01 | kl. 23.15 | |
| Sunnudag | 22.01 | kl. 22.15 | |




## Elizabethtown

*FRUMSÝNING*

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 20.01 | kl. 23.00 | |
| Leygardag | 21.01 | kl. 23.00 | |
| Sunnudag | 22.01 | kl. 22.00 | |




## Stolthed & fordom

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 20.01 | kl. 20.30 | |
| Leygardag | 21.01 | kl. 17.45 | kl. 20.30 |
| Sunnudag | 22.01 | kl. 16.45 | kl. 19.30 |




## Narnia

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 20.01 | kl. 20.00 | |
| Leygardag | 21.01 | kl. 17.00 | kl. 20.00 |
| Sunnudag | 22.01 | kl. 16.00 | kl. 19.00 |

KOMANDI FILMAR:

*FRUMSÝNING*

## Munchen & Nanny McPhee

Fríggjadag 27.01

**www.bio.fo • Telefon 31 19 56**